Heim?, Nei, til Havnar

Ja, so gingu lestrarárini og tú kom heim!

– Heim? Eg kom til Havnar! Ta› var jú einasta sta› í landinum, i› eg kundi fáa naka› at gera vi› mínari útbúgving. Eg byrja›i á Føroya Læraraskúla tann 1. desember í 1965. Ta› var leyst starv, tí einki fast starv var. Sí›ani fekk eg eisini tímar uppi á Føroya Studentaskúla og har byrja›i eg 10. januar í 1966. Ta› hekk jú eisini saman vi›, at brøli› eftir lærarum sum arbei›smegi var øgiligt. Ikki bert í Føroyum, men í øllum kongaríkinum. Vit, sum vóru li›ug á summri í '65, vóru í tí stø›u, at vit kundu heilt einfalt peika á ta›, i› vit vildu hava. Eg minnist, at eg fekk bræv frá 4 rektarum fyri studentaskúlar í Danmark, um eg ikki vildi koma til teirra. Og har vóru ikki mørk fyri, hvat teir kundu hjálpa einum vi›. Tørvurin á lærarum var stórur. Eisini í Føroyum og tey fyrstu 3 árini hev›i eg í logiska í, at ein torir at betrúgva einum lærara at undirvísa einum næmingi t.d. 4 tímar um vikuna í 7 ár. Men so torir ein ikki at lata læraran koma vi› einum kvalifisera›um úttalilsi um stø›una hjá næminginum. Heldur ver›ur ein fremmandur persónur importera›ur, i› skal vera vi› heilar 20 minuttir, ha? So skal hann uppá hesar 20 minuttirnar vera førur fyri at døma ta› sama, Eg havi ilt vi› at síggja logikkin. Fört ver›ur fram ímóti hesum, at lærarin kann vera ímóti næminginum, men er hann ta›, so kann ikki forsvarast, at hann skal hava veri› lærari hjá næminginum alla hesa tí›ina, sigur Hans Holm avgjørdur, sum eisini fegnast um, at broytingar fara fram á hesum økinum og at ta› letur til, at fólk hava skilt hetta.

– Hetta vi› próvtøkum, ja, ein kundi ta› ta› sama havt papageykar, i› plabra›u ta› teir høvdu lært at siga, tí spurningar um, hvørt næmingar høvdu skilt naka› komu ofta í a›ru rø› og kundu gera ta› sama, sigur Hans Holm.

Flokkurin av teimum er stórur, i› hava tiki› eitt prógv, uttan at hava fingi› eina útbúgving burturúr.

veruleikanum hálvt anna› starv, minnist Hans Holm.

Hvussu hevur hildnast, hugsar ein um ungdóm nú og fyrr og um teir lærarar, i› tú hevur havt í tínum tímum?

– Ein má jú siga, at ein broyting er hend innan pedagogikin og háttin at útbúgva fólk uppá, tíbetur. Í dag roynir ein jú í størri mun at seta næmingin í mi›juna. Skulu fólk fáa eina útbúgving, mugu tey sjálvi gera arbei›i›. Í mínari tí› sum skúlanæmingur, og naka› eftir ta›, skuldi ein pent sita í fri› og lata seg belæra og hoyra profetsins or›! Í dag veit mann, at hesum lærir ein allar minst av. Tíverri eksisterar enn hugbur›urin um, at ein gongur í skúla fyri at taka prógv. Fylgjan er tíverri tann, at flokkurin av teimum er stórur, i› hava tiki› eitt prógv, uttan at hava fingi› eina útbúgving burturúr, sigur Hans Holm, sum eisini hevur hug at argast inn á skipanina vi› karakterum, og at hyggja at próvtøkukarakterum, i› sta›in fyri at hugt ver›ur eftir ø›rum kvalifiktiónum, i› eisini krevjast.

– Tí kann eisini róliga skriva, at eg tann dag í dag, 63 ára gamal, ikki begrípi, skipanina vi› próvtøkum. Eg havi ilt vi› at síggja ta› enn í dag. Tíverri má eg heldur siga, at paratvitanin var líka lítil tá, sum í dag, sigur Hans Holm

– Fólk dugdu kanska at reksa upp donsku kongarekkjuna. Men var› so spurt, hvør var kongur í Danmark, samstundis sum Ludvík fjúrtandi, so ana›u tey ta› ikki. Ta› vísir, at einki samband var nakrasta›ni. Eg dugi kongarekkjuna og enntá árstølini, men Gu› viti hvat eg skal brúka ta› til, sigur Hans Holm.

Ofta ver›ur sagt, at paratvitanin var størri fyrr. Eg vil fegin hava loyvi til at føra fram, at hetta er naka› slutur! Tíverri má eg heldur siga, at paratvitanin var líka lítil tá, sum í dag.

Paratvitanin líka lítil sum fyrr

– Ofta ver›ur sagt, at paratvitanin var størri fyrr. Eg vil fegin hava loyvi til at føra fram, at hetta er naka› slutur! Fyri ta› um ein ikki kann ramsa tabellir upp... Lat meg halda meg til mítt fak - geografi. Sagt ver›ur, at fólk dugdi betur høvu›sta›ir og stórar áir fyrr. Ta› passar ikki! Ta› dugdu tey yvirhøvur ikki. Ta› var onkur, i› dugdi, men tey flestu dugdu ikki og paratvitanin var ikki størri fyrr, 2000. At ta› veruliga eru fólk, i› halda, at útbúgving er ein privat sak, i› er ein útrei›sla, sigur Hans Holm og ristur á høvdi›, me›an hann vissar sær, at bla›ma›urin hevur fingi› júst hetta vi›, me›an hann sum ein rættur – fráfarin – lærari, hyggur strangliga yvir hálvu gløsini í lesibrillunum.

– Lat meg t.d. hav loyvi at nevna tær Japan, i› er liberalistiska paradísi hjá øllum búskapar- og markna›arfrø›ingum. Har tekur yvir 98% av fólkinum ta›, i› svarar til okkara studentsprógv. Ta› hongur jú saman vi›, at tey har eru so framkomin, at hetta ver›ur rokna› sum ein fløga, og ikki sum útrei›sla. Legg so til merkis, hvør rindar fyri hetta. Ta› ger vinnulívi›. Tær stóru fyritøkurnar hava sjálvar hægri lærustovnar, fyri at vera vís í at fáa gó›a arbei›smegi. Rokna› ver›ur vi›, at fólk vi› slíkari útbúgving n‡ta eini 5 ár uppá at gjalda hesa fløguna aftur. Ta› vil siga, at frá tey eru um 25 ár, eru tey rein inntøka. Hetta er eisini útfrá teirri ásko›an, at ymsu vinnurnar taka ikki hvør frá ø›rum, men stu›la hvørja a›ra. Hevur ein vinna ta› gott, hava hinar ta› eisini gott, sigur Hans Holm og ger greitt, at hann er heldur ivasamur í, um hetta er hugsanin heima hjá okkum.

Tú sigur, at ymsu vinnurnar liva væl saman og stu›la hvørja a›ra. Tá tosa ver›ur um, hvør livir av hvørjum, vil ta› so siga, at fiskima›urin eisini livir av tær t.d., eins og tú av honum?

– Ja, so avgjørt! Ymsu vinnurnar taka einki hvør frá ø›rum. Eg gjaldi t.d. fullan skatt, smílist Hans Holm.

Tá vit tosa um samfelag og stø›una í dag, so heldur Hans vera rætt at minna á, at politikarar eru ikki teir, i› skulu sita og geva harrabo›, men eru valdir av fólkinum og eru teirra tænastumenn.

Human capital

Eru Føroyar so eitt n‡mótans samfelag?

– Jú, ta› sær ein, bert vi› at hyggja út íg‡gøgnum vindeyga›. Men tann vir›ismiklasta rávøran, i› er til, er jú fólk. Ta› eru ikki lond, i› hava rávøru í undirgrundini, i› eru ríkast og mest framkomin í heiminum í dag. Hinvegin eru ta› tey, i› útbúgva fólki›. Ríkast eru t.d. Japan, Singapore og Taiwan. Tey eiga einki í undirgrundini. Tey hava hinvegin veruliga ta›, i› ver›ur nevnt Human Capital. Hetta er vir›i›, sum er í einum fólki›, i› er væl fyri. Legg til merkis, hvat t.d. Japan ger vi› rávøruar, sum teir fáa frá ø›rum og legg til merkis, hvør ver›ur ríkur av hesum. Ta› eru ikki teir, i› lata rávøruna, sigur Hans Holm.

– Ein sær eisini tey smásamfeløgini á okkara lei›um, i› eru væl fyri, t.d. Kanaloyggjarnar. Tey liva av útbúgvingum, sigur Hans Holm.

Vísma›urin og minnilutarnir

Hvat heldur Hans Holm um at vera kendur sum vitandi ma›ur, vísma›ur, sum fólk venda sær til og sum eigur mangan tíman í útvarpsstovuni, har greitt hevur veri› frá um ymisk vi›urskifti?

– Ja, eg veit ikki hvat eg skal siga til hatta. Eg kann siga, at eg altí› havi havt stóran áhuga fyri heiminum. Ta› er ikki av ongum, at eg havi geografi sum høvu›sfak. Eg havi havt serligan áhuga í smátjó›um og minnilutum fyrst og fremst. Harvi› meini eg ikki, at tjó›skapur er einasti samleiki, identitetur, i› er til hjá fólki. Sannleikin er, at nógv fólk ikki hava fingi› uppfylt síni demokratisku rættindi og hesum havi eg veri› sera uppti›kin av. Til 1970 var› slíkt rudda› av bor›inum, sum fjas. Hvør leg›i í, at ta› vóru onnur í Sovjetsamveldinum, enn russarar. Hesi vóru samnevnd. Eg haldi ta› var vi› VM í 1982, at á sovjetiska fótbóltslandsli›num var bert ein russari! Ta› hoyrdist tó einki um. Í dag ganga fólk høgt uppí hetta og amerikumenn rópa hetta The Ethnic Revival. Yvirhøvur kom ein hugbur›sbroyting og danska stjórinin, i› sat tá og uttanríkisrá›harrin, sum eg haldi kalla›ist Ove Guldberg, var hin fyrsti, i› skipa›i fyri, at føroyingar sluppu at gera sínar egnu uttanríkissamrá›ingar. Eisini var ta› tá, at amerikumenn og australiumenn hildu uppat vi› tvang at royna at integrera upprunafólki›. T.d. var› eisini sagt um teir turkar, i› komu til Danmarkar, at teir høvdu rætt at vera turkar í Danmark, sigur Hans Holm.

– Eg havi ongan fyristilling um, at eg skal vera profetur á umrá›num. Men typiskt fyri tí›ina, so var eg í 1991 á Institutt for Minoritetstudier. Har kundi ein ymiskt og ta› var áhugavert at vera har, læra, hvussu ein arbeiddi vi› fyribrigdinum minnilutar og m.a. eisini finna útav, júst hvat ein minniluti er. Men klárt var, at hetta var n‡tt og at ein líka skuldi finna síni bein, men áhugavert var eisini, tí at har vóru fólk í lei›sluni, sum vóru ómetaliga væl kvalifisera› innan síni øki.

Hvat er ein føroyingur?

– Eitt, sum eg haldi er áhugavert, er hvusuu fólk l‡sa seg sjálvan sum fólk. Føroyingar n‡ta jú máli› at l‡sa seg sjálvan vi›. Hetta hevur ta fylgju, at hildi› ver›ur, at øll onnur fólk í heiminum eiga at n‡ta mál til at l‡sa sín samleika. Ta› er bara ikki so, tí ta› er ógjørligt. Legg til merkis, at ta› eru so nógv, i› ikki kunnu brúka hetta, tak Sveis sum dømi. Tak hugtaki› nationalstatur. Í ST eru kanska eini 180 limalond og ta› eru millum 2000 og 3000 mál til í heiminum. Hugsa vit um okkum sjálvi, so hevur ta› í stóran mun gingi› út uppá at verja føroyskt mál. Stika ta› inni , so vit ikki lærdu onnur mál. Eg veit ikki um fólk vita, at yvir 70% av heimsins fólkum tosa minst tvey mál og hóast hetta letur til, at ta› ikki eru so stórir tjó›skaprligir trup-

ulleikar, sigur Hans Holm.

Hvat er so kriterii›?

– Eg meini, at »kriterii›« finst ikki. Ta› eru øgiliga nógv krittertiir, i› fólk n‡ta. Tey brúka ta›, sum kann brúkast í løtuni. Nøkur n‡ta mál, nøkur søguna og ta› gera vit eisini millum anna›. Hóast ta› helst er so, at nor›urlendska ísletti› í føroyinginum er líti›, so ganga vit høgt uppí, at nor›menn eru okkara fordefrar. Vit vita jú, at bló›typukanningar vísa naka› anna›. Fólk n‡ta ofta søguna og hon n‡tist ikki altí› at byggja á realitetir. Fara vit langt aftur í tí›ina, so eru eisini framkomin fólk, i› hava undarligar figurar, sum forfedrar, stava frá onkrum djóri, ella gudakendari veru. Summi hava enntá sólina sum forfa›ir, sigur Hans Holm, i› vi› gongur, at hetta er ein sera fløktur spurningur.

– Legg tó til merkis, at í Europa eru bert tveir nationalstatir. Statir, i› bert hava eitt fólkaslag. Ta› eru Portugal og Ísland. Allir a›rir statir í Europa hava fleiri enn eitt fólkaslag, sigur Hans Holm, i› ikki dylir, at hetta hevur hansara stóra áhuga, men sum tó ikki rei›iliga vil ella dugir at svara upprunaliga spurninginum um leiklutin sum vísma›ur.

– Eg veit ikki hvat eg skal siga til hatta. Eg haldi hetta vera áhugavert, men eg havi einki ímóti at siga, tá eg ikki veit okkurt, sigur Hans Holm, sum ikki kann lata vera vi› at nevna franska fótbóltslandsli›i›, har bert tveir mans eru, i› ikki hava útlendskar forfedrar.

Ítrótturin

Hans Holm er sera áhuga›ur í ítrótti og hevur veri› virkin innan Hondbóltssambandi›.

– Ja, ta› er ikki tí, at eg nakrantí› havi veri› nøkur ítróttarstjørna sjálvur, langt frá. Var kanska n‡tiligur í 2. deild. Men sum ta› er í Føroyum, so hevur sosiala sí›an av ítróttarliga ungdómsarbei›inum sera stóran t‡dning. Færri og færri fólk liva av at gera likamligt arbei›i, so ítrótturin fær størri og størri t‡dning, bæ›i likamliga, heilsuliga og eisini sosialt og vi›víkjandi uppaling, sigur Hans Holm, i› vi›gongur sítt strongda forhold til elitudyrkan.

– Eg veit ikki, um eg eingang uppfati elitudyrkan sum ítrótt. Heldur ein part av showbussines. Men eg sigi ikki, at ta› ikki skal vera. Kunnu fólk liva av at leika fótbólt, so er ta› í ordan, men eg haldi, at upphældirnar, i› talan er um, eru groteskar. Hugsar ein um, at ta› i› ver›ur goldi› fyri ein fótbóltsleikara, svarar til helmingin av blokkstu›linum, i› Føroyar fáa frá Danmark, so fara deminsiónirnar sín veg, metir Hans Holm.

Er ta› rætt at ganga burtur frá sjálvbodnum arbei›i innan ítrótt, og fáa serfrø›ingar inn, nú fólk hava verri tí› til at taka sær av hesum, tí samfelagshjólini mala skjótari?

– Ja, ta› ver›ur jú gjørt í øllum materielt framkomnum londum. Hetta er tílíkt, i› er kommunalt abei›i. Vit mugu nokk síggja í eyguni, at ta› gongur tann vegin. Um ta› so tekur naka› av gle›ini, ta› tori eg ikki at meta um. Men eitt sum hendir vi› professionaliseringini innan ítróttin er jú, at um vit hyggja at feløgunum, so fer identifiseringin í stóran mun í bakgrundina, í mun til fyrr. Í dag skifta fólk jú felag, sum eg skifti hosur, sigur Hans Holm, sum metir ungdómsarbei›i at hava stóran t‡dning og hevur hann sjálvur havt stóra gle›i av hesum.

Hans er nú farin frá í Hondbóltssambandinum. Í hondbóltstsfelagnum Neistnum er hann framvegis til taks.

Hans er garva›ur hondbóltsdómari og kann ikki lata vera vi› at grei›a skemtiliga frá í hesum sambandi.

– Vit plaga at hava hesar steypakappingarnar, har so og so nógv li› spæla ein leygardag og fólk so koma at døma. Eg kann siga, at næst seinasta vetur dømdu Torbjørn Mikkelsen og eg nakrar dystir og eg haldi, at vit kundu fari› í metbókina, tí vit bá›ir vóru 125 ár tilsamans, grei›ir Hans Holm skemtiliga frá.

Operatúr til Italia

Hans er virkin í Dansifelag Kaggans, men er eisini áhuga›ur í tónleiki. Serliga er ta› jazzur og blues, i› hevur áhuga. Tá Hans sum óviti kom til Danmarkar, kom jazzbylgjan yvir Danmark.

– Í september í 1952 hev›i eg ta› stóra fornoyilsi at vera til konsert vi› Louis Armstrong í KB-høllini. Ta› vakti jú áhuga, sigur Hans Holm, sum eisini eigur stórt savn av gomlum 78 plátum og LP plátum.

Nógv av hesum er nú endurútgivi› á fløgu og Hans dylir ikki, at stóru stjørnurnar í hansara hugaheimi eru Ella Fitzgerald og Louis Armstrong. Men eisini stendur áhugin til skotskan og og írskan fólkatónleik og hann eigur eina plátu vi› The Dubliners, sum hann keypti í 1964, og er hetta helst fyrsta plátan vi› teimum. Hesi árini komu eisini í Danmark fram Cæsar, Per Dick og Poul Dissing, sum Hans eisini eigur plátur vi›.

– Eg havi stóra fragd av tónleikinum. Eg kann siga tær, at naka› av tí fyrsta, sum konan – Sólrun – og eg fara at gera nú, er at fara eina operafer› til Italia, sigur Hans Holm.

– Annars ætli eg mær at síggja ver›ina, me›an eg havi møguleika, og annars halda sambandi› vi› ta›, i› eg havi fingist vi›. Annars havi eg ikki ítøkiligar ætlanir. Eg ætli mær ikki at skriva naka› og so slett ikki setast at skriva lesarabrøv, sum so mong annars n‡ta síni pensjónsár til, sigur Hans Holm smálæandi at enda.

Lundarnir flúgva avsta›

Eftir fáum tímum høvdu teir umbor› á lundaskipinum, Mai, selt 2.500 lundar

JÁKUP MØRK

Upprunaliga var ætlanin, at teir skuldu byrja at selja longu mánadagin, men orsaka› av pappírsarbei›i kundu teir ikki selja fyrstu lundarnar fyrr enn mikudagin. Talan var um onkur tollingarpappír, sum vóru ávegis úr Íslandi, og fyrr enn hesi vóru komin, fekk manningin á Mai einki gjørt.

Nógv til Vi›arei›is

Um hálvgum ellivu tí›ina mikudagin var so alt fingi› upp á pláss, og eftir at skipi› hev›i flutt seg inn móti Bursatanga, var› so fari› í holt vi› søluna.

Ikki kann sigast anna, enn at væl gekst at selja. Tá vit um tr‡ tí›ina mikudagin vitja›u umbor›, høvdu teir longu selt einar 2.500 lundar. Ta› viga›i tó væl í hesum tali, at Hotel Nor› á Vi›arei›i hev›i túsund lundar sendandi nor›.

Hvussu leingi teir fóru at liggja vi› kei, vistu teir ikki at siga umbor›, men væntandi fór hetta at vera, til allir teir 4.000 lundarnir vóru seldir.

Fleyga ikki

Hóast ta› av summum ver›ur rópt lundaskipi›, so fleyga teir á Mai tó ikki lundarnar sjálvir. Ísta›in ver›a teir keyptir frá Íslendskum fleygamonnum, og ver›a sí›ani hagreiddir umbor›. Naka› ver›ur roytt og vaakumpakka›, me›an a›rir bert ver›a reinsa›ir, um so er at keyparin heldur vil royta sjálvur.

Í Íslandi er annars rættuliga vanligt, at lundar ver›a royktir, men sum skilst, hava teir ongar ætlanir hesum vi›víkjandi umbor› á Mai. Sum er gongur ta› jú flúgvandi vi› at sleppa av vi› lundarnar, so í so máta er eingin orsøk til broytingar av nøkrum slag.



Ta› stendur ikki á hjá teimum á Mai at sleppa vi› teir 4.000 lundarnar, sum teir flutt til Føroya

Einki at tosa um

4.000 lundar gera ikki frá ella til á markna›inum tykjast fleygamenn vera samdir um

JÁKUP MØRK

Nøgdirnar av lundum eru somiki› stórar, at ta› hevur einki at siga, um Mai kemur á Havnina at selja 4.000 lundar.

Hetta tykast føroyskir fleygamenn vera samdir um, tá teir ver›a spurdir, hvørt n‡skapandi vinnan hjá Mai kann ska›a søluna hjá teimum.

Ta› ljó›ar kanska eitt sindur ógvusligt, tá 4.000 lundar solei›is koma á markna›in í einum, men hetta tykist so ikki at nerva fleygamenninar.

Umbor› á Mai siga teir seg heldur ikki hava hoyrt naka› um, at a›rir hava fortre› av virksemi teirra.